# Greiðir heimasigrar

Talan gjørdist um fimm greiðar sigrar í teimum fimm dystunum, sum vórðu spældir í gjárkvøldið. Hesir dystir vóru allir partur av tí seinasta undanumfarinum, áðrenn Champions League bólkaspælið. Olympique Lyon vann samanlagt 8-2 á Anderlecht. Í gjár vann Lyon 3-1 á Anderlecht í Bruxelles. Atletico Madrid vann samanlagt 5-2 á Panathinaikos, eftir at senni dysturin endaði við 2-0 sigri til Atletico. Ísraelska liðið, Maccabi Haifa gjørdi ein sannan vørr ímóti eysturríkska liðnum, FC Salzburg. Maccabi Haifa vann samanlagt 5-1. Í gjárkvøldið vann Haifa 3-0 á heimavølli. FK Ventspils hevur ikki so sjáldan gjørt lívið súrt hjá føroyskum felagsliðum í europeiskum kappingum. Men Ventspils vóru langt frá bólkaspælinum hesaferð. Ventspils tapti samanlagt 1-5 ímóti FC Zürich úr Sveis. Sveisiska liðið vann 3-0 á útivølli í tí fyrra dystinum, og seinni dysturin endaði 2-1 á heimavølli. Ungarska liðið, Debrecen vann samanlagt 4-1 á Levski Sofia úr Bulgaria. Í gjárkvøldið vann Debrecen 2-0 á heimavølli.

# Skoraði eftir 31 sekundum



Yakubu, sum hevur millum vandamestu áleypararnar hjá Everton seinnu árini, fekk ikki spælt stóran part av farna kappingarárið, tá hann í november sleit hælsinuna í dysti móti Tottenham. Fyrsti dysturin hjá Yakubu síðani tá var í gjár, tá hann spældi við eykaliðnum hjá Everton í dysti móti Burnley. Og her brúkti hann bara 31 sekund um at leggja everton á odda. Seinni legði hann upp til 2-0 málið, sum Dan Gosling skoraði, áðrenn Yakubu eftir 70 minttunum varð skiftur út.

hugsingur um at vit taka alt ígjøgnum í senn, sigur Bogi Hammer, sum er ein av luttakarunum og fyriskiparunum av kappingini.

- Til kappingina leggja vit sjálvandi nógv meira fyri. Alt skal gjøgnumførast upp á einar 2-3 tímar, og tað er eingin sum helst ivi um, at onkur skaði verður hjá summum luttakarum. Og eg kann vissuliga staðfesta, at eingin venjing verður á skránni dagin eftir kappingina, sigur Sámal Johannis Hansen, sum eisini er ein av luttakarunum.

## Tosa um teknikk

Meðan myndamaðurin og útsendi blaðmaðurin eru í venjingarhølunum, verður tikið á við nøkrum av kappingaramboðunum. Og tosað verður nógv um, hvussu tú best fært gjøgnumført ymsu kappingarnar. Onkrir av sandsekkunum viga eitt sindur oman fyri 100 kilo, so næsti setningurin verður at fáa nakað av sandi úr hesum. Og eisini er týdningarmikið, at sekkirnir eru stramt bundnir, soleiðis at tað er lættari at fáa tak á.

Stamman – ella bulurin – sum skal lyftast upp um høvd oftast gjørligt, er eisini eitt sindur trupult at fáast við. Talan er um svera rammu í stáli, og tí er ikki bara at siga tað at halda javnvágini, samstundis sum lyft verður, so eisini hetta verður nakað av tíð brúkt uppá.

Hinvegin eru dekkið og lyftið av bobbens heldur meira beinleiðis rástyrki, og tí snýr restin av prátinum í høllini seg heldur um bilin, og hvussu tað man vera at fáast við hendan.

## Stórur áhugi

Tá farið varð undir at fyrireika kappingina, vistu menn ikki reiðiliga, hvussu áhugin fór at verða fyri hesum.

Men nú tað av álvara stundar til, tykist luttakaratalið at koma heilt nær teimum 10.

Umframt Boga Hammer, sum stendur fyri største partinum av fyrireikingunum, telur listin Sámal Johannis Hansen, Jákup Petur Djurhuus, Finnur Poulsen, Høgni av Reyni, Bárður Poulsen, Herman Hermanssen, Gunnar Grækarisson og Heri Vestergaard. Hartil hava nakrir mans verið og roynt útgerðina, og tað er ikki heilt óhugsandi, at onkur av hesum eisini teknar seg til kappingina.

- Og sjálvandi vilja vit hava, at talið av luttakarum er so stórt, sum tað er gjørligt. Er onkur sterkur sumbingur, sum heldur seg kunna taka okkum, skal hann sjálvandi vera vælkomin eisini, sigur Bogi Hammer við einum skeivum smíli.



Jákup Petur knossast við ein av teimum fimm 100 kilo tungu sandsekkunum
Mynd: Jens Kristian Vang



Tað sæst á Finni, at tað stendur nógv á, tá tvær ferðir 105 kilo skulu haldast uppfrá
Mynd: Jens Kristian Vang



Sámal Johannis við stóra bulinum, sum her vigar 60 kilo, men sum við vektum kemur upp á 90 kilo
Mynd: Jens Kristian Vang



Eitt bildekk er kanska ikki so tungt, men tað verður strævið, tá tú skalt halda tí í strektum ørmum
Mynd: Jens Kristian Vang